## Illveður í Íslandi

Veðrið hevur verið stak ólagaligt í Íslandi í seinastuni og serstakliga har vesturi í landinum. Eitt lágtrýst fyri og annað eftir eru farin norður ígjøgnum Grønlandsfjørðin, og tey hava elvt til nógvan vind á Vesturlandinum við vindferð upp í einar 50 metrar um sekundið. Í gjárkvøldið í nátt var aftur illveður við nógvum vindi eystaneftir og regni. Tað vánaliga veðrið hevur órógvað samferðsluna á landi, á sjógvi og í luftini.



## Løkir nýggja heimasíðu

Framtaksfelagið Løkir, sum hevur gjørt fleiri stórar íløgur í seinastuni, hevur nú fingið nýggja heimasíðu. P/f Løkir er framtaksfelagið, sum P/f Tjaldur, P/f Krúnborg og P/f Føroya Banki stovnaðu í 2006, skrivar foroya.fo. Felagið hevur til endamáls at gera íløgur í fyritøkur við vakstrarmøguleikum. Seinasta stóra íløgan hjá felagnum var í Statoil Føroyar, sum Løkir gjørdi saman við øðrum føroyskum vinnufyritøkum. Løkir gjørdi eisini í januar í ár íløgu í Farodane, sum síðan er lagt saman við Com-Data og Reproz í samtakið NEMA. Nevndarformaður í Løkir er Petur Háberg Jacobsen. Hinir nevndarlimirnir eru Líggjas í Bø og Bergur Poulsen. Líggjas í Bø er eisini stjóri.

# Skúli stongdur orsakað av leka

**Kostskúlin fyri ung við breki í Runavík varð stongdur fríggjadagin, og allir næmingarnir vóru koyrdur út eina viku áðrenn jólafrítíðin av røttum skuldi byrjað. Orsøkin er, at hálvt ára gamlir lekar nú vóru vorðnir so umfatandi, at streymveitingin eisini er rakt**

SERSKÚLAR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*- Vit vita ikki, nær børn okkara sleppa inn aftur á kostskúlan, har tey búgva og trívast sigur Elenita Hansen, mamma 27 ára gamla Theodor Esmar. Hann er saman við hinum næmingunum á Rásini í Runavík sendur heim til foreldrini, tí skúlin lekur so illa, at støðan er vandamikil fyri búfólki*

Á kostskúlanum, Rásin, í Runavík búgva sjey ung fólk, sum eru millum 25 og 31 ára gomul. Men fríggjadagin vóru foreldrini ringd upp við boðum um at taka ímóti børnunum, tí øll skuldu flyta út úr skúlanum, tí húsinin vóru vandamikil at vera í orsakað av vatnskaðum. Húsini hava likið í langa tíð, og nú er skaðin so umfatandi, at streymveitingin er rakt.

Elenita Hansen úr Kollafirði er mamma 27 ára gamla Theodor Esmar. Hon sigur, at foreldrini hava tosað saman síðani, og tey stúra øll fyri, hvat fer at henda eftir jólafrítíðina. Tey vita ikki, nær vaksnu børnini kunnu flyta inn aftur á stovnin.

- Vit vóru bara ringd upp av kontaktpersónunum hjá børnum okkara og fingu at vit, at tey máttu sleppa heim, tí øll máttu flyta úr skúlanum. Vit hava ikki tosað við leiðsluna, og vit vita ikki, hvat hendir aftaná jól, sigur Elenita.

Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerking frá leiðsluni. Men leiðarin, Jóhan á Plógv, ynskir ikki at útgreina støðuna.

- Næmingarnir eru bara farnir tíðliga í jólafrí, og vit lata upp aftur í januar. Talan er bara um ein lítlan leka, og tað verður tikið hond um tað, sigur leiðarin á skúlanum.

Men foreldrini kenna seg ikki tryggan við støðuna, tí lekin er ikki nýggjur.

- Lekar vóru áðrenn summarfrítíðina, og eftir summarfrítíðina var sett undir lekarnar. Men nú eru skaðarnir so umfatandi, at tað er vandamikið at vera har. Tí kann mann ivast í, hvussu skjótt tað verður at gera, sigur Elenita.

### Tíðaravmarkað verkætlan

Verkætlanin, Rásin, sum er eitt skúlatilboð fyri ung við breki varð sett í verk í 2003. Mentamálaráðið keypti hús í Runavík til verkætlanina. Húsini vóru bygd um til endamálið, og sjey næmingar, Theodor Esmar, Elvin, Halla, Eyðdis, Ruborg, Beinta og Valdemar, byrjaðu í skúlanum.

Talan er um eitt heildartilboð, sum er sett saman av bústaði, skúla og arbeiði, og endamálið er at menna tey ungu til at virka sjálvstøðugt í arbeiðslívi og í gerandisdegnum annars.

Heimasíðan hjá Mentamálaráðnum sigur, at ein partur av undirvísingini er undirvísing og venjing í at búgva uttanfyri heimið – antin í egnari íbúð ella í sambýli við øðrum eftir at skúlatilboðið er liðugt.

Venjing í at húsast er ein týdningarmikil partur av undirvísingini, tí eitt sjálvstøðugt lív er treytað av, at næmingarnir hava kunnleika til tey krøv, samfelagið setur og kunnleika til rættindi og skyldur.

Fyri foreldrini hevur hetta eisini serligan týdning, tí børnini eru vaksin og ynskja ikki at búgva heima. Teir sjey næmingarnir fungera sera væl saman, og foreldrini ynskja, at ein felagsloysn verður funnin til, tá royndarætlanin endar í summar. Men útlitini eru ikki góð. Tey ungu trívast við at búgva fyri seg sjálvan og ynskja heldur ikki at flyta aftur til foreldrini.

### Lógarkrav um bústaðarloysn

Løgtingslóg nr. 67 frá 2. Mai 2003 sigur, at »Ráðgevandi bólkurin skal saman við foreldrum og øðrum myndugleikum fyrireika bústaðar-, frítíðar- og arbeiðstilboð til tey ungu eftir lokið skúlaskeið.«

Foreldrini hava í skrivið til Trivnaðartænastuna sagt seg stúra fyri, at henda lóg ikki verður fylgd, tí einki verður gjørt fyri at fylgja hesum reglum, og ógreitt er hvør myndugleiki hevur ábyrgd á økinum.

- Tá vit vendu okkum til Mentamálaráðið, fingu vit boð um at venda okkum til Almanna- og Heilsumálaráðið, sum vísti seg ikki at kenna nakað til hetta tilboðið, siga foreldrini. Tey hava havt samband við Nærverk og Trivnaðartænastuna, men eingi útlit eru fyri ein felags loysn.

Foreldrini hava umhugsað at gjalda fyri eina felags hús sjálvi, men tey hava ikki ráð til starvsfólk, og keypa tey sjálvi hús, kunnu tey ikki fáa starvsfólk, sum almennir bústovnar fáa.

Tey vilja so fegin, at næmingarnir framhaldandi kunnu búgva saman, tí tað hevur víst seg at virka sera væl. Men boðini, sum tey hava fingið frá Trivnaðartænastuni benda á, at myndugleikarnir eru meira áhugaðir í, at fáa tey býtt út á verandi stovnar ymsa staðni í landinum.

- Lóggávan tykist ov stirvin á økinum, tí tað skuldi bara vera ein fyrimunur at funnið eina felags loysn. Men nú mugu vit í fyrstu syftu vóna, at skúlin verður gjørdur í stand, so vaksnu børn okkara kunnu flyta aftur til tað, sum er teirra heim, sigur Elenita Hansen, foreldur.

## Landsverk vil ikki í valstríð

Landsverk vil ikki viðgera hvørki støðuna á Skúlanum á Trøðni ella Rásini, tí stovnurin vil ikki leggja set út í valstríðið.

- Vit vilja ikki koma við nøkrum viðmerkingum fyrr enn eftir 19. januar, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk.

## Stjóri gevur foreldrum rætt

Foreldur at børnum í Skúlanum á Trøðni kærdu í gjár sína neyð fyri Sosialinum.

Í samrøðu við Rás 2 í dag, sigur stjórin á skúlanum, Jan Christiansen, at hann skilur væl, at foreldur eru ørkymlað. Tí skúlin er ikki í nóg góðum standi, og arbeiðið við svimjihylinum hevur tikið langa tíð.

- Eg havi gjørt vart við støðuna bæði í Mentamálaráðnum og hjá Landsverk, og meira enn tað fái eg ikki gjørt, sigur Jan Christiansen.

Hann sigur, at tað er sera harmiligt at venjingarhylurin stendur óvirkin, tí hylurin hevur stóran týdning fyri venjingina.

- Men vit royna at gera tað besta sum vit kunnu við teim umstøðum, sum vit hava, sigur hann.

Jan Christiansen staðfestir, at síðani skúlin var yvirtikin frá donskum myndugleikunum í 1988, hevur játtanin verið ov lítil á hvørjum árið. Men hann hevði tó vón um, at núverandi landsstýrismaður fór at økja um játtanina komandi ár, men við samgonguslitinum fór tað í vaski.

- Nú fer tað so at vísa seg, hvat komandi landsstýrið fer at gera, sigur stjórin á Skúlanum á Trøðni.